# <ph_1> at hava fartelefon



## Karstin Justesen, 15 ár:

Eg keypti mær sjálvur ein Siemens telefon, men eg býtti um við mammu, tí hon hevði Nokia. Nokia telefonir egna seg betur til at senda eitt nú myndasms við, so tað var nokk tí. Eg brúki hana sera lítið, okkurt um 100 krónur um mánaðin, og eg gjaldi sjálvur sum oftast. Eg sms-i ikki so nógv, ringi faktiskt meira, men tað er so lítið, kortini.

Eg fekk mær telefon, tí øll onnur hava fartelefon, og so eisini fyri at mamma og tey skulu kunna fáa fatur í mær.

## Ansa ov illa eftir fartelefonunum

Fólk ansa alt ov illa eftir fartelefonunum hjá sær. Tað verður staðfest niðri í Telebúðini í gongugøtuni í Havn.

– Vit fáa nógvar fartelefonir inn til umvælingar. Vatnskaðar vísa seg at vera tað, sum gongur oftast aftur, verður sagt frá Telebúðini.

– Fólk ansa ov illa eftir telefonunum. Regn ger stóran skaða, og so eisini bara tað, at tú sveittar í hondini. Eisini um tú hevur verið í einum heitum rúmi, og so fer inn í ein kaldan bil, so kondenserar telefonin, og tað kann í ringasta føri oyðileggja hana.

Tí er umráðandi, at fólk ansa betur eftir telefonunum, um tey vilja sleppa undan at lata hana inn til umvælingar.



## Sunnvør í Kongsstovu, 13 ár:

- Eg havi havt mína fartelefon í eitt sindur meira enn eitt ár. Eg fekk fyrst eina frá beiggja mínum, men eg seldi hana og keypti hesa ístaðin. Hetta er ein Nokia telefon.

Eg havi Tele-tíðarhald, sum eg gjaldi sjálv. Eg brúki hana kanska mest til sms boð, men onkuntíð ringi eg eisini. Fartelefon er sera góð at hava, og tí vildi eg hava eina.



## Hans Jákup Heinesen, 14 ár:

- Eg fekk ta fyrstu telefonina frá mammu, men hon er brotin. Hesa Nokia telefonina havi eg so fingið frá babba. Tað er okkurt um eitt til hálvtannað ár síðani, veit ikki ordiliga. Vit hava kiosk sjálvi, so man kann kanska siga, at eg fái kortini, men eg brúki ikki nógv. Umleið 150 til 200 krónur um mánaðin. Babba keypti telefonina til mín, so at tey kunna fáa fatur á mær, serliga um kvøldarnar, tí vit búgva á Viðareiði, og so er tað gott, tá eg eri í Klaksvík. Eg haldi, at eg brúki telefonina meira til sms enn at ringja við.



## Nokia klárt á fremsta plássi

Í Telebúðini í Havn eru tey ikki í iva um, hvørjar fartelefonir selja mest. Tað eru Nokia telefonirnar 3410 og 3510.

– Hetta kemst av sms-boðunum. Myndirnar kunnu blinka, og so kanst tú eisini fáa ringitónar niður á telefonina, siga tey úr Telebúðini.

– Eisini selja tær bíligu Siemens telefonirnar væl. Tað verið seg M50 og C45.

Í Telebúðini selja tey eisini nógvar »frontar«, sum tey kalla tað. Hetta er hylstur til telefonina, sum tú kanst seta uttaná, ístaðin fyri vanliga hylstrið. Soleiðis kanst tú fáa tína telefon í nógvum ymiskum og spennandi litum og samansetingum.

Tá tað kemur til tey eldru, hugsa tey meira um »designið« og hvat tað er telefonin kann gera.

Nógv verður eisini selt av fartelefontilhoyri. Taskur, oyrasniglar og so víðari.



## Rannvá Isaksen, 14 ár:

- Tað er okkurt um eitt og eitt hálvt ár síðani, eg fekk mína Nokia fartelefon frá babba. Eg brúki umleið 100 krónur um mánaðin, og tað er babba, sum rindar Teletíðarkortini.

Eg ynskti mær fartelefon, tí at so kunnu øll, sum vilja, fáa fatur í mær.

## Fartelefonin er komin fyri at vera

Fyri nøkrum fáum árum síðani vóru tað fá, sum áttu eina fartelefon. Tey, sum áttu eina fartelefon tá, høvdu eitt stórt skrímsl av eini telefon, sum tú ikki ein gongd kundi stappa niður í buksulumman ella í skjúrtulumman.

Í dag hava øll fartelefon. Biiip her, og biiip har er at hoyra, hvar tú so vendir tær. Backstreet Boys og B36 sangurin kima allastaðni tú fer. Fartelefon er »in« nú. »Trendið«. Tað er »hip« at eiga eina fartelefon.

– Hetta er nakað, sum sæst aftur í øllum Evropa, ja kanska øllum heiminum, sigur Andras Róin, stjóri á Føroya Tele.

– Grundirnar eru nakrar til, at fartelefonin er so væl umtókt í dag. Tann eina er sms-boðini, har tú hevur ein heilt nýggjan hátt at samskifta upp á. Fartelefonin er eisini vorðin bíligari at brúka enn fyrr, hon er minni og hon er stuttligari at fáast við.

Andras Róin vísir á, at fyri nøkrum árum síðani, gingu øll tey ungu við einum Game Boy í hondini. Hann heldur, at fartelefonin er bara komin inn í myndina ístaðin fyri Game Boy.

– Fartelefonin er ein samantvinning av nógvum ymsum. Tú kanst spæla, verða á internetinum, chatta, lurta eftir útvarpinum, lurta eftir tónleiki, senda sms-boð og ikki at gloyma at tosa, sigur Andras Róin.

Stjórin á Føroya Tele metir ikki, at fartelefonin fer út av móta.

– Telefonirnar broytast longu hvørt ár, og eg giti, at tær fara at megna at fylgja við mótarákinum sum er nú. Sjálvur meti eg, at fartelefonin er komin fyri at vera.